

# FRÁGREIÐING

## UM VIRKSEMIÐ HJÁ NBH

2015 - 2021

# *Innihaldsyvirlit*

| | |
|---|---|
| Norðoya Bú- og Heimatænasta | 4 |
| Tænastur | 10 |
| Demensætlan | 34 |
| Korona | 35 |
| Avbjóðingar | 36 |
| Starvsfólkamenning | 40 |
| Verkætlanir og framtíðarætlanir | 41 |
| Fígging | 45 |

***Nærvera***
***Fleksibilitetur***
***Álit heldur enn eftirlit***

# Norðoya Bú- og Heimatænasta

## Virðisgrundarlag og strategi

Tá ið eldraøkið tann 1. januar 2015 varð flutt kommunun-um at umsita, avgjørdi stýrið fyri Norðoya Bú- og Heima-tænastu, NBH, ikki at gera stórar broytingar á økinum beinanvegin. Stýrið setti sær hinvegin fyri at nýta fyrstu tíðina til umfatandi og nágreiniligar kanningar av eldra-økinum, so haldgott grundarlag fekst fyri at leggja eina strategi fyri framtíðarvirksemið hjá NBH.

Kanningararbeiðið fevndi bæði um kvalitativar dialog-fundir við brúkarar, avvarðandi, starvsfólk og aðrar fakbólkar og umfatandi nøgdsemiskanning,[1] har teir brúkarar, ið kunnu svara fyri seg, ein avvarðandi um-boðandi hvønn brúkara og øll starvsfólk vórðu spurd.

Kanningarnar avdúkaðu nøkur felags virðir, sum hava týdning fyri brúkarar, avvarð-andi og starvsfólk. Tey eru:

- Nærvera
- Fleksibilitetur
- Álit heldur enn eftirlit

Hesi virðini eru somuleiðis grundarlagið undir visjónini, sum er orðað fyri NBH:

*NBH strembar eftir at skapa fjøltáttaðar møguleikar fyri nærveru, eldri borgarum, avvarðandi og starvsfólkum at gagni.*

*NBH vil raðfesta fleksibilitet og samskapan í teimum loysnum, ið hereftir skulu finnast á eldraøkinum.*

*Fyritreytin er eitt hugvekjandi øki, sum er grundað á álit, høgt fakligt stig og virðing.*

Kanningarúrslitini vístu m.a. heilt greitt, at eldri vilja búgva heima sum longst, sum er í samsvari við gransking á eldra-økinum og við eldralógina, sum ásetur, at kommunurnar skulu veita heimabúgvandi fólkapensjónistum tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt, soleiðis at pensjónisturin kann búgva í egnum heimi sum longst.

*Endamálið er at veita borgarum við tørvi á hjálp eina samskipaða heildartænastu*
Strategiin fyri framtíðarvirksemið hjá NBH varð í 2016 løgd út frá úrslitunum í kanningini, har dentur er lagdur á at styrkja tær tænasturnar, sum stuðla undir møguleikan fyri at búgva heima. Ein tilgongd, ið miðsavnar seg um heilsuframa, fyribyrging og rehabilitering.

Íverksetanin av strategiini er komin væl áleiðis, men enn standa stór tøk fyri framman, so sum at byggja nýggjar og hóskandi bústaðir til aldrandi ættarliðið.
Tað eru nú sløk seks ár, síðani seinasta nøgdsemiskanning varð liðug, og stýrið hevur tikið undir við, at nýggj nøgd-semiskanning verður gjørd í 2022. Úrslitini verða grundar-lagið undir tillaging í verandi strategi og vegleiðandi í sambandi við nýggjar leiðir.

[1] https://nbh.fo/wp-content/uploads/2017/07/ngdsemiskanning-nbh-august-2016-almenn.pdf

# Skipan

Kommunurnar í Norðoyggjum – Fugloyar, Viðareiðis, Kunoyar, Hvannasunds og Klaksvíkar kommuna – hava skipað javnbjóðis samstarv[2] um heimatænastu og eldrarøkt v.m. í Norðoya Bú- og Heimatænastu. Virksemið hjá NBH er í høvuðsheitum skipað eftir løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021,[3] vanliga umrødd sum eldralógin, og løgtingslóg nr. 20, eisini frá 7. apríl 2014, kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.[4] Endamálið í eldralógini er at veita borgarum við tørvi á hjálp eina samskipaða heildartænastu og er lýst soleiðis í § 1:

*Stk. 2. Endamálið við heildartænastuni er:*

*a) at fyribyrgja sjúku,*
*b) at stimbra sálarligu og likamligu heilsu og trivnað borgarans,*
*c) at endurmenna mistan førleika,*
*d) at stimbra møguleika hins einstaka at klára seg sjálvan,*
*e) at veita røkt og umsorgan.*

*Stk. 3. Hjálpin skal taka atlit til tørv, trivnað, fortreytir og sjálvsavgerðarrætt borgarans og skal í størst møguligan mun verða veitt í samráð og í samstarvi við hin einstaka og í øðrum lagi við tey avvarðandi, við samtykki frá tí einstaka.*

Stýrið fyri NBH er mannað við borgarstjórunum í kommunala samstarvinum í Norðoyggjum umframt seks kommunustýrislimum í Klaksvíkar kommunu.
Karl H. Johansen, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, er stýrisformaður, og Katrin Næs, borgarstjóri í Hvannasunds kommunu, er næstformaður. Í undanfarna stýri var Jógvan Skorheim, táverandi borgarstjóri í Klaksvík,



***Endamálið er at veita borgarum við tørvi á hjálp eina samskipaða heildartænastu***

formaður, og Hans Jákup Kallsberg, táverandi borgarstjóri í Viðareiðis kommunu, var næstformaður.

Marna Ellingsgaard Jensen er stjóri í NBH.

Nærri kunning um umsiting og bygnað sæst á heimasíðuni.

https://nbh.fo/um-okkum/leidsla-og-fyrisiting/
https://nbh.fo/um-okkum/bygnadur/

# Eldraráðið

Sambært §6, stk 2, í eldralógini kunnu kommunurnar seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast. Í sambandi við kommunalu yvirtøkuna av eldraøkinum varð Eldraráðið í Klaksvík á kommunuvalinum í 2016 umskipað til eitt felags eldraráð fyri allar Norðoyggjar, svarandi til tað økið, sum NBH fevnir um og varðar av.

[2] https://nbh.fo/wp-content/uploads/2017/06/avtala-um-javnbjis-samstarv-millum-kommunurnar--noroyggum.pdf
[3] https://logir.fo/Logtingslog/19-fra-07-04-2014-um-heimataenastu-eldrarokt-vm
[4] https://logir.fo/Logtingslog/20-fra-07-04-2014-um-kommunalt-samstarv-um-heimataenastu-eldrarokt-vm

Endamálið hjá eldraráðnum er at vera ráðgevi hjá NBH og at betra og útbyggja sambandið millum eldri borgarar í Norðoyggjum og NBH. Viðtøkurnar fyri eldraráðið síggjast á heimasíðuni hjá NBH.[5]

Árliga eru í minsta lagi fýra fundir millum NBH og Eldraráðið í Norðoyggum. Samstarvið millum NBH og Eldraráðið hevur verið og er framvegis av stórum týdningi fyri menningina av tænastunum og skipanum í NBH. Nevnast kann, at Eldraráðið hevur ein fastan lim í bygginevndini hjá NBH og hevur arbeitt fyri, at neyðstreymsaggregat koma á búeindirnar. Sambýlið á Heygnum hevur fingið eitt, og ætlanin er, at Heimið við Vágna fær neyðstreymsaggregat í næstum.

## Starvsfólk

Hjá NBH starvast umleið 250 starvsfólk, og tey telja stívliga 175 ársverk. Á mynd 1 sæst býtið millum fakbólkarnar og ársverk í desember 2015, 2018 og 2021. Bæði tal á starvsfólkum og ársverkum er munandi vaksið hesi árini, og tað er ein endurspegling av økta virkseminum hjá NBH. Størsti vøksturin sæst hjá

***Virksemið hjá NBH er munandi økt, og sæst hetta aftur í m.a. økta talinum á starvsfólkum og ársverkum***

røktarstarvsfólkum við ongari heilsufakligari útbúgving. Eitt av virðunum hjá NBH er høgt fakligt stig, og tí fara vit framhaldandi at skipa góðar karmar fyri fakligari menning og eggja starvsfólkum at taka av teimum møguleikunum, ið finnast til at menna seg innan yrkið.

**1. Starvsfólk í NBH, tøl og ársverk, des. 2015, 2018 og 2021**




## Borgarar

Tað finnast ikki neyv hagtøl fyri, hvussu nógvir borgarar í Norðoyggjum fáa einhvørja tænastuveiting, men mett verður, at tað liggur um 300 borgarar. Um ikki visiterað tilboð, so sum eginvenjing í Ven og Virka og fyribyrgjandi heimavitjanir, verða tald við, er talan um á leið 500 borgarar í Norðoyggjum, sum so ella so hava samband við NBH.

[5] https://nbh.fo/wp-content/uploads/2020/09/vidtoekur-fyri-eldraradid-i-nordoyggjum-2021-2024.pdf

# Tænastur

Allar áheitanir um tænastur frá NBH skulu sambært eldralógini § 3, stk, 1 viðgerast við støði í eini fakligari meting.

Tænastur og tilboð hjá NBH fevna um:

- Heimatænastu
  - *- Røkt og praktiskan stuðul*
  - *- Sjúkrarøkt*
  - *- Praktiska hjálp*
- Fysio- og ergoterapi
- Eginvenjing
- Samdøgursrehabilitering
- Mattænastu
- Stuðul til reingerð
- Fyribyrgjandi heimavitjanartænastu
- Dagtilhald
  - *- Búðatrøð, sum er ætlað fólkapensjónistum við demenssjúku*
  - *- Sóljuna, opið dagtilhald fyri fólkapensjónistar í Norðoyggjum*
- Virkishúsið Smæruna
- Sjálvboðið arbeiði í samstarvi við Eldraráðið og Reyða Kross
- Umlætting
- Ansing
- Bústovnar

# Heimatænastan

Sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. skulu kommunurnar veita heimabúgvandi borgarum heimatænastu eftir tørvi.

*Stk. 2. Heimatænastan er tænasta, sum fevnir um: 1) Heimahjálp. 2) Heimasjúkrarøkt.*

*Stk. 3. Heimahjálp verður veitt borgarum, sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt ella stuðli.*

*Stk. 4. Heimasjúkrarøkt fevnir um sjúkufyribyrging, sjúkrarøkt, endurmenning, uppsøkjandi arbeiði og almenna heilsuvegleiðing.*

Játtanin til virksemið í Heimatænastuni er munandi økt síðani 2015 í samsvari við íverksetanina av framtíðarstrategiini fyri NBH. Nevnast kann uppnormering av vaktunum til átta tímar, arbeiðsbilar og sjúkrarøktarfrøðingar, sjúkrarøktarfrøðingar í vakjandi náttarvakt, sum hevur við sær, at Heimatænastan nú kann veita sjúkrarøkt eftir tørvi alt samdøgrið til bæði heimabúgvandi borgarar og búeindirnar.

Tað er altíð ávíst sveiggj í talinum á borgarum, ið antin fáa heimahjálp, sjúkrarøkt ella bæði. Tøl frá jan. 2022 vísa, at tað eru 140 heimabúgvandi borgarar knýttir at heimatænastuni. Av teimum borgarunum, ið eru knýttir at Heimatænastuni, er yvirvág av kvinnum – bæði í heimahjálpara- og sjúkrarøktarfrøðingabólkinum. Tænastan verður í høvuðsheitum veitt borgarum, sum eru 67 ár og eldri. Mynd 2, 3 og 4.

**2. Tal á borgarum, sum fáa tænastuveitingar
í Heimatænastuni, jan 2022**




**3. Borgarar, ið fáa heima-
sjúkrarøkt, jan. 2022
- býtt á kyn og aldur**




**4. Borgarar, ið fáa
heimahjálp, mars 2022,
býtt á kyn og aldur**






Mynd 5 vísir gongdina í Heimatænastuni.Tølini eru tald í januar 2017, 2019, 2020 og 2022. Samlaða talið á borgarum, ið fáa tænastu, er minkað úr 259 til 132 í 2019, og sæst serliga aftur hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Orsøkin er helst tann, at ambulatoriið hjá sjúkrarøktarfrøðingum, har borgarar kundu venda sær uttan ávísing, varð niðurlagt í hesum tíðarskeiðnum. Tað komst av, at Heimatænastan flutti úr leigaðum hølum hjá KBI út á Stoksoyraveg og síðani í núverandi hølir í Bøgøtu 32. Ætlanin er at gera nýtt ambulatorii í núverandi hølum, sum er ogn hjá NBH, so henda tænastuveitingin kann setast inn aftur.

**5. Tal á borgarum, sum fáa tænastuveitingar
í Heimatænastuni, jan., 2017-2022**




Tænasturnar, ið heimahjálparabólkurin veitir, verða skrásettar í 3V-skipanini, sum í høvuðsheitum er ein faktureringsskipan, haðani tað eisini ber til at fáa nøkur hagtøl. Á mynd 6 og 7 sæst tal á veitingum og tal á veittum tímum fyri hvønn borgara í tíðarskeiðnum frá 2015 til 2021. Fram til 2019 sæst ein minking í veittum tænastum. Tað er ilt at siga, hvør orsøkin er, men NBH hevur lagt dent á at menna heilsufremjandi og fyribyrgjandi tænastur, so sum fyribyrgjandi heimavitjanir, víðkaðar upplatingartíðir í dagtilhaldum, skipaða venjing

og tilboð um eginvenjing, rehabilitering, mattænastu allar dagar í árinum, sjúkrarøkt alt samdøgrið til heimabúgvandi borgarar o.s.fr. Í 2020 og 2021 sæst ein munandi vøkstur, og tað stendst uttan iva av koronufarsóttini, sum hevði við sær, at umrøddu tænastur í longri tíðarskeið vórðu niðurlagaðar.

6. Tal á veitingum í heimatænastuni - heimahjálp




7. Tal á tímum fyri hvønn borgara




***Heilsu-fremjandi, fyribyrgjandi og rehabiliterandi tænastur vórðu niðurlagaðar undir koronufarsóttini. Hetta sæst aftur í tølum hjá Heimatænastuni***

# Fysio- og Ergoterapieindin, Ven og Virka

Endamálið, sambært eldralógini, er at veita tænastur, sum stuða undir, at borgarin kann búgva heima sum longst:

*§ 10. Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónistum tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at pensjónisturin kann búgva í egnum heimi sum longst.*

*Stk. 2. Tænasturnar kunnu fevna um dagtilhald, ergoterapi, fysioterapi, endurvenjing, fyribyrgjandi venjing, viðlíkahaldsvenjing, dagtilboð, mattænastu, umlætting, koyritænastu, vegleiðing o.s.fr.*

Endamálsorðingin hjá eindini er soljóðandi:

*Stuðla undir at borgarin varðveitir, mennir ella endurvinnur sín virkisførleika, soleiðis at hann er so virkin og sjálvbjargin sum gjørligt. Borgarin skal kunna vera sum longst í egnum heimi, lívi og luttaka í samfelagnum.*

*Stuðla undir góða heilsustøðu hjá borgaranum og vera við til at fyribyrgja afturgongd í førleikastøðuni hjá borgaranum.*

Arbeiðið hjá terapeutunum fer fram í venjingarhølunum, heima hjá borgarum og á búeindunum. Ergoterapeutarnir luttaka somuleiðis í visitatiónini til tænasturnar hjá NBH.

Virksemið í Ven og Virka er nógv vaksið, síðani eldraøkið var lagt út til kommunurnar at umsita. Í dag eru meiri enn 250 borgarar í Norðoyggjum skrásettir hjá Ven og Virka. Nýggj tilboð og nýggjar tænastur, so sum eginvenjing, samdøgursrehabilitering, viðlíkahalds- og endurvenjing, eru farnar av bakkastokki. Mynd 8.
Á vári 2021 samtykti stýrið at keypa venjingarútgerð til hølir í skúlanum á Viðareiði. Tey eru nú sett upp, og NBH fegnast um, at tað ber til at bjóða borgarum norðan fyri Fjall sama venjingartilboð sum í Klaksvík.

**8. Virksemið í V&V - tal á veitingum og borgarajournalum, 2016-2021**






## Tænasturnar hjá Ven og Virka stuðla undir, at borgarin skal kunna vera sumlongst í egnum heimi og lívi og luttaka í samfelagnum

Henda gondin hevur eyðvitað kravt størri starvsfólkaorku í Ven og Virka, har tað í dag starvast fýra fysioterapeutar, tríggir ergoterapeutar og ein heilsurøktari, mótvegis tveimum fysio- og tveimum ergoterapeutum í 2015.

Tænasturnar, ið Ven og Virka veitir, hava mest sum altíð eina heilsufremjandi, fyribyrgjandi og/ella rehabiliterandi tilgongd í samsvari við strategiina hjá NBH um at styrkja tær tænastur, sum eldri fólk ynskja sær, og sum kunnu stuðla undir bæði likamligan, sálarligan og sosialan virkisførleika og harvið økja um møguleikan fyri, at eldri í Norðoyggjum kunnu búgva heima sum longst.

Starvsfólk hjá NBH hava møguleika at venja ókeypis í Ven og Virka sum ein liður í starvsfólkarøkt, men eisini fyri at stuðla undir góða heilsustøðu.

Ven og Virka er somuleiðis karmur um kvøldskúlatilboð hjá Klaksvíkar kommunu, har 60+ kunnu koma til venjing. Tilboðið er skipað í samstarvi millum fysioterapeutarnar í Ven og Virka og kvøldskúlaleiðaran.

Koronufarsóttin hevði stóra ávirkan á virksemið í Ven og Virka. Serliga skipaða venjingin, eginvenjingin og samdøgursrehabiliteringin vórðu niðurlagaðar. Starvsfólkini í Ven og Virka sóu týðiliga afturgongd í førleikastøðinum hjá brúkarunum undir farsóttini, so hóast farsóttin eisini herjaði í 2021, bar til hjá teimum at skipa virksemið undir tryggum kørmum, soleiðis at tænastan vaks í mun til 2019. Mynd 9.

9. Eginvenjing, skipað venjing og samdøgursrehabilitering, 2018-2021




# Eginvenjing

NBH bjóðar tveir dagar um vikuna fólkapensjónistum í Norðoyggjum eginvenjing í Ven og Virka, bæði í Klaksvík og á Viðareiði, t.v.s. at borgarar kunnu venja í venjingarhølunum ókeypis. Tilboðið er uttan vegleiðing frá starvsfólkunum í Ven og Virka, men nýggir luttakarar fáa terapeutiska vegleiðing í at nýta venjingartól o.a. ráðgeving.

Sum heild eru hetta fólk, ið eru sjálvhjálpin, men tað eru nógv dømi um eldri fólk, ið hava fingið skipaða venjing, og sum síðan halda fram í eginvenjingini. Talið á teimum, sum koma til eginvenjing, er støðugt vaksandi og í dag eru uml. 80 borgarar, ið gagnnýta tilboðið.



# Samdøgursrehabilitering

Er tilboð, sum NBH bjóðar heimabúgvandi fólkapensjónistum í Norðoyggjum, ið hava fingið afturgongd í førleikastøðuni og hava ynski og tørv á at endurvinna mistar førleikar og at megna gerandisdagin á best møguligan hátt.

Yvirskipaða endamálið er, at fólkapensjonisturin megnar sín egna gerandisdag í tann mun, tað ber til, og fær møguleika fyri at búgva heima sum longst.

Samdøgursrehabiliteringin, ið byrjaði við tveimum plássum í 2018, er staðsett á Sambýlinum á Heygnum og er skipað við einum tvørfakligum toymi. Í toyminum eru ergoterpeutar, fysioterapeutar og sjúkrarøktarfrøðingur. Heilsustarvsfólk á sambýlinum eru somuleiðis virkin í rehabiliteringstilgongdini allan sólarkringin. Tilboðið er tíðaravmarkað, og málið fyri rehabiliteringina tekur støði í ynskjum og tørvum hins einstaka í samsvari við nýggju allýsingina av rehabilitering í "Hvidbogen".[6]
Tørvurin á samdøgursrehabilitering er stórur, og bíðilisti er til hetta tilboðið, sum so líðandi er økt og telur nú fimm pláss á Sambýlinum.

# Mattænastan

Talið á borgarum í Norðoyggjum, sum fáa døgurða bornan heim, er skiftandi og liggur millum 40 og 60.
Í 2015 var tað einans møguligt at fáa heitan mat gerandisdagar, men nú kunnu borgarar fáa mat allar dagar í árinum, við tað at maturin verður borin út kaldur. Borgarin kann síðani hita matin sjálvur ella fáa hjálp til hetta frá Heimatænastuni. Mattænastan er ein týðandi, fyribyrgjandi tænasta, ið stuðlar undir at kunna búgva heima sum longst. Maturin verður framleiddur í køkinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og NBH skipar flutningin.
Tænastan verður veitt mótvegis gjaldi.

[6] https://www.rehabiliteringsforum.dk/siteassets/publikationerlitteratur/hvidbog-2-udgave_180522-til-web.pdf

# Fyribyrgjandi heimavitjanir

Eldralógin áleggur kommunum at bjóða øllum, sum eru 75 ár og eldri, eina fyri-byrgjandi heimavitjan.

*§ 11. Kommunurnar skulu bjóða øllum borgarum, sum eru vorðnir 75 ár, fyribyrgjandi heimavitjan. Stk. 2. Heima-vitjanirnar verða lagdar til rættis eftir tørvinum í økinum. Í minsta lagi skulu kommunurnar bjóða eina fyribyrgjandi heimavitjan um árið.*

*Stk. 3. Kommunurnar kunnu víkja frá stk. 1 og 2, um talan er um borgara, sum fær aðra tænastu sambært hesi lóg.*

Í samsvari við lógina bjóðar NBH øllum borgarum, sum eru 75 ár og eldri og ikki longu fáa tænastur frá NBH, eina árliga fyribyrgjandi heimavitjan, har heilsuráðgevin í NBH kemur á gátt. Endamálið við tænastuni er at stimbra heilsu og trivnað, at byrgja fyri sjúku, at stimbra evnini at vera virkin og at kunna um heilsufremjandi tilboð, ið kunnu stuðla undir at búgva heima sum longst.

Heilsuráðgevin vísir borgarum á tilboð hjá NBH og kommununum, ið kunnu stimbra undir heilsu og ein virknan gerandisdag. Eisini vísir hann beinleiðis til aðrar tænastur hjá NBH og til kommunulækna, um tørvur er á tí. Á myndini niðanfyri sæst %-býtið millum teir borgarar, sum eru sera virknir og megna gerandisdagin fult út (Aktiv), og so tær tilvísingar, ið eru gjørdar til aðrar tænastur.

Hóast talið á eldri er vaksið, og fleiri hava fingið bjóðað fyribyrgjandi heimavitjan í hesum tíðarskeiðnum, so er talið og prosentbýtið millum tey, sum taka av vitjanini, munandi minkað mótvegis teimum, ið ikki vilja hava vitjan, sí myndirnar 10 og 11.

10. Tal á borgarum




11. Býtið millum tey, sum vilja hava og ikki vilja hava vitjan



Tað er ilt er at meta um, hví gongdin er hendan, og hvørt tað ávirkar dygdina í tænastuni. Ein broyting í tilgongdini er tann, at heilsuráðgevin ringir til allar borgarar, sum í brævi hava fingið tilboð um vitjan, eina mest tí at hann ofta kom á læstar dyr. Vinningurin í at ringja er, at tað fæst ein ábending um, hvussu eldri fólk sum heild eru fyri, og heilsuráðgevin í NBH metir, at teir borgarar, sum ikki taka av, í høvuðsheitum eru sera virknir, heilsuliga væl fyri og fleiri teirra framvegis knýttir at arbeiðsmarknaðinum. Somuleiðis verður mett, at nógv eldri í Norðoyggjum eru vorðin kunnug við tilboð og tænastur hjá NBH og í kommununum annars, síðani tær fyribyrgjandi heimatænasturnar byrjaðu.

Hinvegin vísa hagtølini, at av teimum, sum taka av fyribyrgjandi heimavitjanum, eru lutfalsliga nógv, sum verða víst til aðrar tænastur/tilboð, bæði í og uttan fyri NBH. Við nýggju tilgongdini ber kanska til at siga, at tænastan er effektiviserað og rakar neyvari tann bólkin av eldri, sum hava størstan tørv á fyribyrgjandi heimavitjan. Henda gongdin er lýst í mynd 12. Miðalaldurin á teimum, sum taka av og ikki taka av vitjan, sæst á mynd 13.

12. %-býtið millum sjálvhjálpin og víst til tænastur




13. Fyribyrgjandi heimavitjanir, miðalaldur




Mynd 14 vísir býtið millum sjálvhjálpin og tey, sum vórðu víst til tænastur/tilboð í 2021, og hvørjar tær eru. Flest allar ávísingarnar eru til tænastur ella tilboð frá Ven og Virka.

14. Fyribyrgjandi heimavitjanir, 2021



%-parturin av teimum, ið eru 75 ár ella eldri og fáa bjóðað fyribyrgjandi heimatænastu, er vaksin knappliga 10%. Mynd 15.

Fyrbyrgjandi heimavitjanir í NBH eru einans ætlaðar teimum, sum ikki fáa aðrar tænastur frá NBH, og tí kann sigast, at hesin bólkurin av eldri er vorðin sjálvbjargnari í tíðarskeiðnum 2016-2021.

15. %-parturin av 75+,
ið fær tilboð um fyrib.heimav.




## Stuðul til reingerð

Vitandi um, at fleiri borgarar aftra seg við at keypa sær reingerðartænastu orsakað av gjaldinum, tey mugu rinda, samtykti stýrið í 2017 at fara undir eina royndarverkætlan, har fíggjarligur stuðul varð veittur til reingerð til í mesta lagi 30 fólkapensjónistar. Brúkarin rindaði tá 200 kr. heldur enn 300 kr., sum var ásetti prísurin hjá reingerðarfyritøkunum. Stuðulin er nú fastur partur av tænastuveitingunum hjá NBH og er eisini hækkaður, soleiðis at brúkarin rindar 125 kr. fyri hvønn reingerðartíma. Pláss er nú fyri 40 heimabúgvandi fólkapensjónistum í skipanini. Treytin fyri at fáa stuðul er, at pensjónisturin hevur ein mettan tørv á stuðli til reingerð og eina inntøku svarandi til vanliga fólkapensjón. Stuðul verður veittur til reingerð ein tíma um vikuna.



***Í dagtilhaldunum verður dentur lagdur á at skipa ein innihaldsríkan gerandisdag og á heilsumennandi og fyribyrgjandi virksemi***

## Dagtilhald

Í NBH eru tvey dagtilhald, Dagtilhaldið Búðatrøð og Dagtilhaldið Sóljan.

**Dagtilhaldið Búðatrøð**
Búðatrøð er dagtilhald fyri borgarar heimabúgvandi í Norðoyggjum, sum hava fingið staðfest eina demenssjúku. Tey húsast í norðara enda á fyrstu hædd á Heiminum við Vágna. Starvsfólkini hava servitan og drúgvar royndir á demensøkinum.
Pláss er fyri 8-12 brúkarum.

Umframt dagtilhald veita starvsfólkini á Búðatrøð eisini avvarðandi og øðrum áhugaðum vegleiðing, ráðgeving og undirvísing í demensspurningum. Sum liður í at skapa demensvinaliga samfelagið er Búðatrøð farin í samstarv við Skúlatrøð um at undirvísa øllum 9. floks næmingum um demens. Júst hesin aldurin er valdur, tí tá byrjað ung ofta at arbeiða í tænastuvinnuni, har tey kunnu rokna við at møta menniskjum við demensi.
Búðatrøð arbeiðir í tøttum samstarvi við Heimatænastuna og demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum.

Hagtøl hjá Búðatrøð vísa, at hetta tilboðið útsetir tørvin á búplássi millum 2 og 4 ár.

Endamálið hjá Búðatrøð er:

- Við rættari viðgerð og hjálp at stuðla undir ein skipaðan, innihaldsríkan gerandisdag, ið er merktur av lívsgleði og trivnaði hóast sjúku.
- Við vegleiðing, ráðgeving og undirvísing stuðla familjunum, so tær gerast førar fyri at veita tann stuðul og ta hjálp, ið krevst at vera um ein avvarðandi, sum hevur fingið eina demenssjúku.
- At stuðla undir sjálvsavgerðarrættin við støði í førleikum hins einstaka.
- Dagtilboðið skal gera tað møguligt hjá menniskjum við demensi at búgva heima sum longst.

Virksemið í Búðatrøð er víðkað og er nú opið allar gerandisdagar, bæði um dagin og nøkur kvøld um vikuna. Orsakað av koronu minkaði virksemið munandi í 2020, sum sæst á mynd 16.

| Vitjanir á Búðatrøð | | | |
|---|---|---|---|
| 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
| 1436 | 1306 | 1124 | 1323 |

*Mynd 16*

**Dagtilhaldið Sóljan**

Dagtilhaldið Sóljan er opið dagtilhald, ætlað fólkapensjónistum í Norðoyggjum. Dagtilhaldið hevur hildið til á Heiminum við Vágna síðan 2014, men flutti í februar 2020 inn í nýumvæld leiguhøli á Stoksoyravegi 39, sum eru innrættað til virksemið.



Endamálið við Dagtilhaldinum er, at øll skulu kenna seg hjartaliga vælkomin í dagtilhaldinum til hugnaliga samveru í hugnaligum umhvørvi, har dentur verður lagdur á heilsumennandi og fyribyrgjandi virksemi, ið eggjar borgaranum at vera virkin í egnum lívi.

Størsti áhugin at vitja dagtilhaldið er hjá teimum gomlu eldru, sum hava fingið ávísar heilsuligar avbjóðingar.

Virksemið fer fram bæði inni í dagtilhaldinum (dansur, fimleikur, upplestur, sangur, handarbeiði, bingo o.s.fr.) og uttanfyri (útferðir, festivalar, veitslur, jólasøla o.s.fr.).

Starvsfólkini í dagtilhaldinum hava heilsufakligar útbúgvingar (sjúkrarøktarfrøðingur og heilsuhjálpari), og partur av starvinum er eisini at gera heimavitjanir eftir áheitan frá visitator, avvarðandi e.ø.

Virksemið er støðugt vaksið, og í dag vitja millum 25 og 30 fólk dagliga. At eta døgurða saman er tilboð, sum hóast koronu er vaksið og víðkað til fýra dagar um vikuna, mynd 17. Opna tilboðið í Sóljuni hevur verið skipað í avmarkaðar og visiteraðar bólkar í koronutíðini, og virksemið varð munandi skert partar av 2020, Mynd 18.

17. Døgurðar í Sóljuni




18. Døgurðar í Sóljuni í 2020



# Sjálvboðið arbeiði

Eldraráðið skipar í samstarvi við NBH og Reyða Kross fyri sjálvbodnum arbeiði, har fólk vitja á bústovnum og heima hjá borgarum. Leikluturin hjá NBH er at geva fakliga ráðgeving um neyðugt fyri at gera tey sjálvbodnu út til uppgávuna.

# Virkishúsið Smæran

Virkishúsið Smæran er eitt tilboð til allar borgarar í Norðoyggjum yvir 60 ár. Har eru ymisk virkistilboð, ið fremja heilsu, trivnað og møguleikar fyri at skapa netverk og vinabond. Tað stendur øllum frítt at koma við uppskotum ella at fyriskipa tiltøk; tó er tað eitt brúkararáð í Smæruni, sum samskipar tiltøkini. Tey, ið manna brúkararáðið, eru: Jona Nielsen, Eyðfinn Hansen, Poul Havn, Erik Andreasen og Jetta Ellingsgaard.

Tilboðini eru ikki privat og skulu vera óheft politiskt og átrúnaðarliga; tó kunnu íbúgvarnir undir Kráarbrekku og búfólk á Norðoya Vistarheimi og Sambýlinum í Bøgøtu leiga Smæruna til egnar føðingardagar og merkisdagar, eins og Smæran kann leigast út til felagsskapir, ið hava tilknýti til fólk yvir 60 ár.

Virksemið er brúkarastýrt, og Smæran er karmur um nógv ymiskt virksemi, so sum sosiala samveru við kaffi og hugnapráti aftan á eginvenjing í Ven og Virka, vikulig tiltøk fyri menn og kvinnur, pensjónistafelagið Hugni, Eldrabólkurin, tiltøk í sambandi við torradagar, fráferðarløta hjá Team Rynkeby, fyrilestrar, veitslur, hátíðarhald, fundir hjá eldraráðnum, undirvísing fyri starvsfólkum hjá NBH, kvøldskúlavirksemið fyri 60+ og annað.

Ársfrásagnirnar siga, at tað vanliga eru meiri enn 3.000 vitjanir í Smæruni árliga, men eins og alla aðrastaðni hevur korona avmarkað vitjanirnar í bæði 2020 og 2021, har alt virksemið hevur ligið stilt stóran part av hesum árunum.

# Umlætting

Er týðandi tænasta, sum stuðlar undir, at borgarin kann verða heima sum longst, eins og tað léttir um hjá teimum, sum varða av. Í 2017 varð umlættingareind við átta plássum skipað á Heiminuhvørt hóttafall kemur, sum ger, at tað er neyðugt at vera heimanífrá í eina tíð. Eisini ber til at fáa styttri umlættingar, um avvarðandi hava tørv á at fáa frí til eitthvørt.

Talið á umlættingardøgum er munandi vaksið frá 2015 til 2016 og síðani aftur frá 2020 til 2021, sum helst skyldast, at fleiri hava verið í langtíðar umlætting, tí tey ikki høvdu møguleika fyri at fara heim aftur. Mynd 19. Orsøkin kann møguliga vera, at fleiri eldri undir koronu upplivdu sosiala isolatión og lækkandi førleikastig. Hetta sæst eisini aftur í, at bíðilistin til fast búpláss vaks heilt fitt hesa tíðina. Meiri um tað í øðrum broti.

Mynd 20 vísir, hvussu nógvir borgarar hava verið til umlætting, og dagar í miðal fyri hvønn borgara frá 2015 til 2021.

19. Tal á uml. døgum, tils.




20. Tal á borgarum og dagar í miðal



*Dentur verður lagdur á trivnað og at nøkta tørvin hjá tí einstaka. Andin í heiminum skal vera merktur av virðing fyri tí einstaka búfólkinum.*

# Ansing

Kommunurnar kunnu velja at geva samsýning fyri ansing eftir teimum treytum, sum eru lýstar í § 12 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Ansingin verður umsitin eftir ásetingunum í kunngerð nr. 127 frá 17. desember 2014 um umsiting av samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum.[7]

NBH hevur frá byrjan veitt samsýning fyri ansing, og tað er eldraøkið í Føroyum, sum veitir lutfalsliga flest ansingarsamsýningar. Talið á ansarum hevur verið millum 7 og 13 hesi árini. Játtanin hækkaði í 2021 úr 12 til 14 samsýningar, harav tann eina verður nýtt til fleksibla ansing, tað vil siga, at starvsfólk kunnu sita inni hjá borgara nakrar tímar, um tørvur er hjá avvarðandi at fara av húsum til t.d. eitthvørt frítíðarvirksemi.

# Búeindir

Eldrabúpláss er ætlað teimum borgarum, sum hava tørv á støðugari hjáveru. Treytirnar fyri búplássi eru ásettar í eldralógini:

*§ 14. Røktarheim og eldrasambýli eru bústaðir, ið hýsa fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.*

[7] https://nbh.fo/wp-content/uploads/2017/04/kunnger-nr-127-2014-samsning-fyri-ansing.pdf

Lógin heimilar í serligum førum, at fólk yngri enn 67 ár kunnu fáa fast pláss á eldrabústovnum.

Avgerð um fast pláss verður tikin í upptøkunevndini, sum er mannað við stjóra, varastjóra, deildarleiðarum og visitator. Avgerðin er fakliga grundað, og nevndin skal tryggja, at borgarin við størsta tørvi fær fremstu raðfesting.

Í 2015 vóru 87 føst búpláss. Síðani eru trý pláss, orsakað av trongum umstøðum, niðurløgd. Eitt á Sambýlinum í Bøgøtu, eitt á Norðoya Ellis- og Vistarheimið og eitt á Sambýlinum á Heygnum, har samdøgursrehabiliteringin kravdi fleiri fermetrar. Sostatt eru í dag 84 samdøgurpláss, ið fevna um 71 búpláss, 8 umlættingarpláss og 5 pláss til samdøgursrehabilitering. Mynd 21.

Mynd 22 vísir broytingina í talinum á føstum búplássum, og hvussu leingi fólk búgva í miðal á búeindunum í NBH. Føstu búplássini eru minkað 5 pláss, men bútíðin er tann sama, knappliga hálvfjóðra ár í miðal. Hetta er væl hægri enn á donskum røktarheimum, har bútíðin er 2 ár og átta mánaðir í miðal.

22. Búpláss og bútíð (ár) í miðal




21. Døgnpláss



Mynd 23 vísir, at árliga talið á teimum, sum fáa fast búpláss, er rættiliga støðugt, hóast føstu búplássini eru minkað síðan 2015. Heimið við Vágna læt upp í 2013, og tað er orsøkin til stóra talið tá.

23. Tal á borgarum, sum




Kanningarnar av eldraøkinum í Norðoyggjum vístu, at búfólk kenna seg at hava ov lítla ávirkan á egnan gerandisdag. Sum úrslit av hesum setti NBH 1. januar í 2017 tveir samskaparar í starv, ið arbeiða hálva tíð. Endamálið er saman við bú- og starvsfólkum at skapa ein innihaldsríkan og lívsjáttandi gerandisdag. Búfólkini eru sera glað fyri hesar vitjanirnar, og saknurin hevur verið stórur í koronutíðini, tá ið vitjanirnar vórðu niðurlagdar ella nógv avmarkaðar.

Dentur verður lagdur á trivnað og at nøkta tørvin hjá tí einstaka. Saman við búfólkunum vilja vit skapa eitt trygt og livandi umhvørvi, ið byggir á álit millum búfólk og starvsfólk. Andin í heiminum skal vera merktur av virðing fyri tí einstaka búfólkinum. Búfólkini skulu hava umstøður at ráða yvir degi og lívi sínum, tó við fyriliti fyri lívshátti hjá hinum búfólkunum.

At búgva heima er í samsvari við ynskini hjá teimum eldru og verður mett at hava stóran týdning fyri trivnað, lívsgóðsku og heilsu hjá eldri fólki. Ætlanin um at byggja eldravinaligar íbúðir kann eisini hugsast at fara at minka um tørvin á røktarheimsplássum, ið er tann kostnaðarmiklasta tænastan at reka.

Sum áður lýst, so hevur koronufarsóttin ávirkað mest sum alt virksemið hjá NBH, og avleiðingarnar hava verið isolatión í egnum heimi og á búeindunum, eins og afturgongd í førleikastigi. Hetta sæst týðiliga aftur í bráðfeingis bíðilistanum til fast búplass. Mynd 24. Sum møguligt úrslit av strategiini, ið miðsavnar seg um heilsuframa, fyribyrging og rehabilitering, sást at bráðfeingis bíðilistin minkaði eyðsýnliga fram til 2020 og vaks so aftur, og í februar 2021 vóru tað 18 fólk, ið høvdu bráðfeingis tørv á búplássi. Tørvurin sær tó út til at minka aftur. Mynd 25.

24. Bíðilisti til búpláss, miðaltøl




25. Bíðilisti til búpláss




Í NBH eru 5 búeindir.

https://nbh.fo/buplass/sambylid-a-heygnum/
https://nbh.fo/buplass/nordoya-ellis-og-vistarheim/
https://nbh.fo/buplass/sambylid-i-boegoetu/
https://nbh.fo/buplass/nordoya-roektarheim/
https://nbh.fo/buplass/heimid-vid-vagna/

***Talið á føroyingum, ið fáa eina demenssjúku, fer helst at tvífaldast næstu 25 árini***

# Demensætlan

Kanning hjá Mariu S. Petersen í 2018, PhD, av títtleikanum av demensi á eldrabýlunum í Føroyum[8] vísti, at NBH var einasta eldraøkið, ið ikki hevði eina demenseind burturav. Mett varð neyðugt at betra bæði um fysiskar karmar og starvsfólkaførleikar fyri at kunna møta tørvinum á vaksandi talinum á eldri fólki við demenssjúkum. Farið varð tí undir at orða og implementera eina staðbundna demensætlan fyri NBH við støði í demensætlanini fyri Føroyar [9] og kanningini hjá Mariu S. Petersen.

Fígging er avsett til implementering í eitt fimmáraskeið. Byrjað varð við at umskipa Sambýlið í Bøgøtu til eitt demensheim, har øll starvsfólk fingu skipaða undirvísing um demens. Síðani vórðu upplatingartíðirnar í Búðatrøð víðkaðar til at umfata tilboð um dagin og kvøldið, eins og møguligt er at hava opið um vikuskiftið. Í 2020 tóku 10 starvsfólk eina longri útbúgving sum demenssamkiparar.

Ætlanin er at uppraðfesta leiklutin hjá demenssamskiparunum í Heimatænastuni og útvega fleiri búeindir til fólk við demenssjúkum.

[8] http://www.alzheimer.fo/wp-content/uploads/2018/09/Ti%CC%81ttleikin-av-demensi_final.pdf

[9] http://cdn.lms.fo/media/6374/demens%C3%A6tlan-gloymsk-men-ikki-gloymd.pdf



# Korona

Sum lýst gjøgnum alla frágreiðingina hevur koronufarsóttin í stóran mun sett dagsskránna fyri virksemið hjá NBH í 2020 og 2021.

Neyðugt hevur verið at orða og støðugt laga til-búgvingarætlanir og teststrategiir alt eftir, hvussu koronustøðan hevur verið í landinum.

Hetta hevur verið sera tíðar- og orkukrevjandi fyri øll, bæði heimabúgvandi brúkarar, búfólk, starvsfólk og avvarðandi. Vit fegnast um, at avmarkingarnar nú eru burtur og gerandisdagurin fer at líkjast sær sjálvum aftur.

Øll eiga stóra tøkk uppiborna fyri tey megnartøk, ið eru tikin fyri at forða smittuni at breiða seg, serliga á búeindunum.

Koronutíðin hevur lært okkum, at tað ber til skjótt at umskipa virksemið, tá ið kringumstøðurnar brádliga broytast. Fremsti lærdómurin er kanska, hvussu stóran týdning hondreinføri og reinføri annars hevur í sjúku-fyribyrging og í síðsta enda fyri heilsu, trivnað og lívsgóðsku teirra eldri.

Í kjalarvørrinum av farsóttini hava øll starvsfólk fingið arbeiðsbúna við búmerkinum hjá NBH. Búnin verður skiftur dagliga og vaskaður á arbeiðsplássinum. Hetta er umráðandi átak fyri smittuverjuna og ikki minst týðandi fyri samleikan hjá NBH sum ein sjónligur og viðkomandi stovnur fyri heilsu og trivnað hjá borgarum í Norðoyggjum.

***Øll starvsfólk hava í kjalarvørrinum av farsóttini fingið búna og NBH ein felags samleika***

*Tørvurin á skikkaðum starvsfólki er uttan samanbering størsta avbjóðingin hjá NBH*

# Avbjóðingar

Hóast støðugt fleiri eldri uppliva heilsugóðan aldurdóm, hevur gongdin á primera økinum í heilsuverkinum, har eldraøkini eru týðandi partur, verið merkt at støðugt vaksandi kompleksiteti. Hetta stendst av, at tað eisini gerast fleiri eldri við samansettum avbjóðingum, so sum multisjúkum (fleiri ymiskum sjúkum) og umfatandi medisinsk viðgerð, demenssjúkur og styttri innleggingar-tíðir, har viðgerðin ofta heldur fram í heiminum. Hetta setur stór krøv til fakligu førleikarnar hjá starvsfólkunum.

NBH vantar – eins og onnur eldraøkir, bæði í Føroyum og uttanlands – starvsfólk og ikki minst skikkað starvsfólk. Og hetta er uttan samanbering høvuðsavbjóðingin hjá NBH.

Sum víst í innganginum er hópurin av røktarstarvsfólkum við ongari heilsufakliga útbúgving vaksin, bæði í tali og ársverkum. Tey eru flest øll limir Heilsuhjálparafelagnum. Mynd 26 vísir, at síðani 2019 hava verið fleiri starvsfólk við ongari útbúgving enn við heilsuhjálparaútbúgving. Heilsuhjálparanir arbeiða í miðal á einum hægri brøki. Hóast hetta hava ársverkini hjá starvsfólkum við ongari útbúgving verið fleiri frá 2020, mynd 27.

26. Býtið millum starvsfólk við og uttan útb. í Heilsuhj.-felagnum - starvsfólk




27. %-býtið millum starvsfólk við og uttan útb. í Heilsuhj. felagnum - ársverk




Um hugt verður at býtinum millum starvsfólk við og uttan heilsufakliga útbúgving í mun til samlaða talið á heilsu-starvsfólkum og ikki einans limum í Heilsuhjálpara-felagnum (sjúkrarøktarfrøðingar, fysio- og ergoterapeutar, heilsurøkt-arar, heilsuhjálparar og starvsfólk við ongari heilsufakligari útbúgving,) er gongdin júst tann sama. Mynd 28

28. Býtið millum starvsfólk við og uttan heilsufakliga útbúgving og samlaða talið á heilsustarvsfólkum




Havandi demografisku framskrivingarnar og framtíðartørvin á starvsfólkum á vælferðarøkinum í huga er hetta ein avbjóðing, sum sambært frágreiðingum hjá Búskaparráðum um demografiska dráttin [10] og starvsfólk á vælferðarøkinum[11] fer at vaksa og seta verandi vælferðarskipanir undir stórt trýst.

Orsøkirnar til vantandi skikkað starvsfólk eru helst fleiri og samansettar og verða ikki viðgjørdar neyvt her, men hetta er eyðsæð ein avbjóðing, ið má takast til viðgerðar í størsta álvara fyri at tryggja fakliga nøktandi og fíggjarliga haldførar tænastuveitingar til eitt vaksandi og aldrandi ættarlið.

[10] https://www.landsbankin.fo/Files/Images/B%C3%BAskaparr%C3%A1%C3%B0i%C3%B0/2019%202%20buskapar-fragreiding_heystid_2019.pdf

[11] https://www.landsbankin.fo/Files/Images/B%C3%BAskaparr%C3%A1%C3%B0i%C3%B0/2021%20temafr%C3%A1g-rei%C3%B0ing-v%C3%A6lfer%C3%B0ar%C3%B8ki%C3%B0%2021.pdf



Framskrivingar, ið Hagstovan gjørdi fyri NBH á sumri 2018, vísa – eins og fyri alt landið – at lutfallið millum arbeiðsfjøldina og fólkapensjónistarnar støðugt minkar, so at í 2057 arbeiða góð tvey fólk fyri hvønn fólkapensjónist í mun til knappliga fýra í dag. Mynd 29.

29. Lutfallið 16-66 / 67+ í Norðuroyggjum 1985-2057.
Hagstovan,11. juni 2018




Tað er serliga talið á teimum, sum eru 80 ár og eldri, ið sambært Kommunufelagnum fer at taka dik á seg næstu árini. Mynd 30.

30. Árligur vøkstur í talinum á fólki, ið eru 80 ár ella eldri, 2000-2060




Tal á fólki 80 ár og eldri og 16-66 ár. Index, 2020=100



# Starvsfólkamenning

NBH hevur høgt fakligt stig sum part av visjónini. Eldraøkið er, sum lýst omanfyri, sera samansett, og tænastuveitingarnar krevja tí stóra fakliga vitan, men tað er torført at rekruttera skikkað starvsfólk til økið – arbeitt verður tí støðugt við at skapa eitt hugvekjandi øki, sum eisini er við í visjónini fyri NBH.

NBH nýtir fíggjarliga og aðra orku til førleikamenning, og starvfólk hava ment seg innan fyri demens, palliatión, parkinson, fyrstuhjálp, samskifti, sorg, etikk, vælferðartøkni, seinheilaskaða, ergonomi, pínu- og sárviðgerð, grundleggjandi røkt, rehabilitering, hjálpartól, sansaintegratión, fólkaheilsu, umsiting av heilivági, kliniska vegleiðing, leiðslu og mong onnur økir.

Ásannandi, at fakligir førleikar eru alneyðugir, fer NBH undir skipaða undirvísing fyri starvsfólk við ongari heilsufakligari útbúgving, og fyrstu skeiðini verða hildin í mars 2022.

***Eldri kunnu hava sera samansettar heilsutrupulleikar, og tað krevur tí stóra fakliga vitan og førleikar***

# Verkætlanir og framtíðarætlanir

NBH hevur síðan 2015 hýst fleiri royndarverkætlanum, sum hava økt um vitanina á økinum, lagt lunnar undir nýggjhar tænastur og bøtt um verandi virksemi.

Dømi um slíkar verkætlanir eru:

- Fíggjarligur stuðul til reingerð
- Nýtsla av vælferðartøkni til alarmskipanir, fjarsamskifti og møguleikar fyri fjarrehabilitering
- Screening av sjón, hoyrn og ljósviðurskiftum í heiminum
- Dygdarmenning í Heimatænastuni, har sjóneykan er sett á skjalfesting, fakliga og etiska refleksjón, nágreining av førleikaprofilum hjá heilsurøktarum eins og á menning og skipan av samstarvi tvørtur um eindir og fakbólkar í NBH.

**Førleikaprofilar**
Nágreining av førleikaprofilum er krav frá Styrelsen for Patientsikkerhed[12] fyri at tryggja búfólkum og heimabúgvandi borgarum í Norðoyggjum eina tænastu við góðari 'sjúklingatrygd'. Umframt hetta hava førleikaprofilar stóran týdning í sambandi við, at heimildir og fakligir førleikar hjá øllum fakbólkum verða nýttir til fulnar. NBH metir nágreiningina av førleikaprofilum sum part av arbeiðnum at gera NBH til eitt hugvekjandi øki, har starvsfólk vilja verða verandi, og hagar nýggj starvsfólk vilja koma.

[12] https://stps.dk/da/

**Rehabilitering, umlætting og demenstænasta**

Arbeitt verður støðugt við at menna tilboð og tænastur í NBH. Í hesi tilgongd er millum annað viðgjørt, hvussu best er at skipa karmarnar um rehabilitering, umlætting og demenstænastuna.

Í dag er samdøgursrehabiliteringin staðsett inni á Sambýlinum á Heygnum, sum sostatt hýsir bæði føstum búplássum og rehabilitering. Hetta verður mett óheppið fyri báðar tænasturnar, og avgerð er tikin um at flyta umlættingardeildina frá Heiminum á Vágni til Sambýlið á Heygnum. Sambýlið á Heygnum verður við hesum ein depil, har samdøgursrehabilitering og umlætting í eitt avmarkað tíðarskeið stendur heimabúgvandi borgarum í Norðoyggjum í boði. Hetta eru tænastur, sum hóska væl saman og stuðla undir, at tað ber til at búgva heima sum longst.

Núverandi umlættingardeid á Heiminum við Vágna verður í somu tilgongd skipað sum demenseind í samsvari við demensætlanina hjá NBH, og harvið fara Búðatrøð, sum er dagtilhald fyri fólk við demenssjúkum, og nýggja demenseindin at húsast á niðaru hædd á Heiminum við Vágna, sum sostatt burturav verður karmur um demenstænastur.

**Nýbygging**

Í eldralógini er orðað, at eldrasamstørvini kunnu seta ymiskar tænastur á stovn fyri at hjálpa teimum eldru at kunna búgva í egnum heimi sum longst.[13] Í hesum sambandi hevur stýrið fyri NBH tikið avgerð um, at tænastudepil skal byggjast á Viðareiði, ið fevnir um hølir til heimatænastu, dagtilhald, venjing og ergo- og fysioterapi. Gongst sum ætlað, verður tænastudepilin liðugur á heysti 2024.

[13] https://logir.fo/Logtingslog/19-fra-07-04-2014-um-heimataenastu-eldrarokt-vm, §10 a



Sum partur av strategiarbeiðnum hjá NBH eftir nøgdsemiskanningina í 2016 vórðu ætlanir lagdar um at byggja dagførdar búeindir fyri Norðoya Ellis- og Vistarheim og Sambýlið í Bøgøtu. Vitandi um stóra starvsfólkatørvin, sum ikki gerst minni tey komandi árini, verður mett neyðugt at leggja tær smærru eindirnar saman, soleiðis at starvsfólkatilfeingið verður gagnnýtt á skynsamasta hátt. Tí eru ætlanir um at byggja størri búeindir enn hesar.

Stundum hendir tað hjá hjúnum, at annað fær ein røktartørv, sum kann elva til, at tað gerst neyðugt at flyta á bústovn. Avleiðingin er, at hjún, sum hava livað eitt langt lív saman, verða skild sundur. Hesum oftast óynsktu kommunalu hjúnaskilnaðum vil NBH fyribyrgja, soleiðis at tað skal bera til hjá hjúnum at búgva í nánd av hvørt øðrum, hóast annað býr á bústovni. Hetta er ein av orsøkunum til, at NBH hevur í hyggju at byggja eldradepil í Klaksvík, ið fevnir um bupláss og eldraíbúðir eins og hølir til ergoterapi, fysioterapi, venjingarhølir, dagtilhald, heimatænastu o.a.

**Talgilda heilsuskipanin Cosmic**

Øll løggild starvsfólk, eins og starvsfólk uttan løggilding, sum við avhending útinna heilsutænastur, hava skyldu til at skjalfesta sítt virksemi.  Tá ið eldraøkið varð flutt kommununum at umsita, skjalfestu øll framvegis við blýanti og pappíri, sum als ikki var nøktandi, hvørki í viðvíkjandi dátutrygd ella greiðari og neyvari skjalfesting.

Saman við Kommunufelagnum varð farið undir tilgongd at fáa eldraøkini við í talgildu heilsuskipanina Cosmic, sum verður nýtt í stórum pørtum av heilsuverkinum í Føroyum, t.d. í sjúkrahúsverkinum og kommunulæknaskipanini. Ætlanarskriv um samstarv millum Heilsu- og innlendismálaráðið og Kommunufelagið um felags nýtslu av talgildu heilsuskipanini varð í mars 2019 undirskrivað av Sirið Stenberg vegna sjúkrahúsverkið, og Dennis Holm vegna kommunufelagið.

Trý eldraøkir, Heilsu- og Umsorganartænastan í Tórshavnar kommunu, Roðin og Norðoya Bú- og Heimatænasta, eru pilotøkir í verkætlanini at fyrireika og íverkseta Cosmic, sum við tíðini væntandi fer at umfata øll eldraøkini í Føroyum.

Verkætlanin hevur verið nógv tarnað í koronutíðini, men vónir eru um, at Cosmic verður íverksett á Sambýlinum á Heygnum, sum er pilotdeild í NBH, í 2022.

# Fígging

Síðan eldraøkið varð latið kommununum at umsita, hevur fíggjarligi leisturin verið tann, at kommunurnar árliga hava fingið endurgjald frá landinum samsvarandi forskatting av pensjón, DIS og FAS, og til kommunalu samstørvini fyri umsiting av eldraøkjunum hava tær rindað eftir, hvussu nógvir borgarar í økinum eru 67+.

Samlaðu útreiðslurnar eru øktar munandi frá 2015 til 2021, sum sæst á mynd 31.




Orsøkirnar til nógv øktu útreiðslurnar eru fleiri. Lønarvøkstur er helst høvuðsorsøkin, eins og menningin av verandi tænastum og nýggju tænasturnar, sum stýrið fyri NBH hevur avgjørt at seta í verk í hesum tíðar-skeiðnum. Onnur orsøk er fólkafrøðiligu broytingarnar, har tað gerast fleiri eldri. Á mynd 32 sæst, at talið á fólka-pensjónistum í Norðoyggjum, sum NBH í høvuðsheitum veitir tænastur, veksur samsvarandi útreiðslunum.

32. Íbúgvar 67+ í Norðoyggjum, 2014 -2021




Í Norðoyggjum fingu nakrar kommunur fyrstu tíðina avlop orsakað av hesum býtislykli, sí mynd 33.

| Munurin millum gjald til NBH og gjald frá landinum (tkr) | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
| *Kommunur:* | | | | | | | |
| **Fugloyar** | -47 | -111 | -35 | 28 | -21 | 47 | 37 |
| **Viðareiðis** | -333 | -298 | -412 | -91 | 215 | 104 | 267 |
| **Hvannasund** | -476 | -8 | 234 | 376 | 250 | 397 | 412 |
| **Klaksvíkar** | 4.918 | 3.912 | 6.327 | 8.443 | 6.132 | 8.489 | 11.392 |
| **Kunoyar** | 90 | 141 | -1 | -85 | -77 | -26 | -39 |
| **Samanlagt** | **4.152** | **3.636** | **6.113** | **8.671** | **6.499** | **9.011** | **12.069** |

Enn hevur Klaksvíkar kommuna hevur ikki fingið størri upphædd frá landinum, enn hon hevur rindað til NBH. Sum sæst í talvuni omanfyri, hevur hon árliga rindað millum slakar 4 og 11,4 mió. kr. meira, enn hon hevur fingið frá landinum.

Árligu nettoútreiðslurnar hjá hvørjari kommunu í Norðoyggjum sær síggjast í mynd 34.

| Nettoútreiðslur hjá hvørji kommunu sær | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
| **Fugloyar kommuna** | 582.563 | 649.732 | 641.186 | 632.424 | 564.131 | 702.684 | 702.684 |
| **Viðareiðis kommuna** | 2.394.983 | 2.600.914 | 3.013.573 | 3.372.923 | 3.384.785 | 3.361.062 | 3.591.494 |
| **Hvanna-sunds kommuna** | 2.783.359 | 3.118.317 | 3.526.521 | 4.145.884 | 4.583.563 | 4.854.867 | 5.074.938 |
| **Klaksvíkar kommuna** | 48.931.222 | 49.303.247 | 52.311.550 | 56.988.344 | 58.669.606 | 62.590.438 | 67.691.862 |
| **Kunoyar kommuna** | 1.682.962 | 1.500.938 | 1.410.608 | 1.545.923 | 1.339.811 | 1.568.495 | 1.795.747 |

Býtið av útreiðslunum millum kommunurnar verður roknað við støði í talinum á borgarum, sum eru 67 ár og eldri tann 31. des. árið fyri. Prosentvísa býtið av útreiðslunum millum kommunurnar í NBH er lýst í mynd 35.

35. %-býtið millum kommunurnar av útreiðslunum í NBH




Brúkaragjøldini fíggjaðu fyrstu árini góð 10% av samlaðu útreiðslunum, men orsakað av, at tey ikki eru dagførd síðan útleggingina, fevna tey í 2021 bara um 6,8% av samlaðu útreiðslunum.

Á mynd 36 sæst %-vísa gongdin viðvíkjandi gjøldum frá kommununum og brúkara-gjøldum.

36. %-býtið millum kommunal og brúkaragjøld




Sáttmálasamráðingar hava verið fleiri ferðir, síðan eldraøkið gjørdist kommunalt.

Í talvuni niðanfyri (mynd 37) sæst, at lønarútreiðslurnar eru øktar munandi í hesum tíðarskeiði:

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lønir** | 48.200.387 | 50.081.197 | 53.023,895 | 58.336.852 | 60.683.201 | 63.775.495 | 68.205.667 |

Mynd 38 vísir prosentpartin, sum lønirnar telja í mun til útreiðslurnar hjá NBH:

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **%parturin – lønir** | 98,5% | 87,6% | 87,1% | 87,5% | 88,5% | 87,3% | 86,5% |

Sostatt telja lønirnar alstóran part av útreiðslunum á eldraøkinum í Norðoyggjum.

NORÐOYA
BÚ- OG HEIMATÆNASTA